




## Rólant Poulsen
*borgarstjóri í Eiðis kommunu*

**Hvat merkir tað, at skuldin hjá Eiðis kommunu nú er størri enn ein álíkning?**
- Tá ein kommuna skyldar minni enn eina álkning, avgerð kommunan sjálv sín íløgukarm. Tað, sum bygdaráðið tá er samt um, verður vanliga góðkent í Fíggjarmálaráðnum. Men tá skuldin fer yvir eina álíkning, kemur kommunan mest sum undir umsiting og ger ikki sjálv av, hvørjar prioriteringarnar verða.

Rólant Poulsen sigur, at Eiðis kommuna soleiðis hevur verið noydd at halda aftur í verkætlanin við nýggja fótbóltsvøllinum fyribils.

**Nær væntar tú, at kommunuskuldin aftur kemur undir eina álíkning?**
- Vit liggja í løtuni einar tvær miljónir krónur yvir eina álíkning, men skattainntøkurnar í ár eru størri enn seinasta ár. Eg vóni tí, at myndin verður broytt, soleiðis at inntøkurnar eru størri og skuldin minni enn ein álíkning, tá vit eru komin út í helmingin av 2011.

**Hvussu stór er ein álíkning í Eiðis kommunu?**
Ein álíkning liggur um slakar 19 miljónir krónur, og skuldin í dag liggur beint undir 21 miljónir krónur, harav langfreistaða skuldin liggur um 12 miljónir krónur.

Rólant Poulsen sigur, at Felagsskúlin á Oyrarbakka er vorðin nógv dýrari enn ætlað, eins og útbyggingin av Røktar-og Ellisheiminum í Runavík, sum kommunan eisini er partur av, eisini er vorðin nógv dýrari enn ætlað.

# VANDU Í TUNLINUM

**Í morgun varð eyka væl saltað á Oyggjarvegnum, tí Kollafjarðartunnlin varð stongdur í tríggjar tímar vegna venjing**



Randi Jacobsen

Fólk í Havn vóru illa við í morgun, tá ið sløkkiliðsbilar, sjúkrabilar og politibilar fóru ýlandi norðureftir.

Eingin ólukka var tó hend, men ein stór venjing var í Kollafjarðartunlinum.

Lutakararnir vóru bæði úr Havn og norðanfyri, úr Vágum og úr Eysturoynni.

Vindurin lá móti Kaldbaksfirði, so betur bær til at sleppa inn í tunnilin úr hinum munnanum, men hjálparfólk vóru kortini við hin munnan eisini.

Í morgun varð lýst við, at Kollafjarðartunnilin fór at verða stongdur frá klokkan níggju til middags. Venjingin byrjaði kortini ikki klokkan níggju.

Lýst varð eisini við, at í staðin fyri gjøgnum tunnilin gekk ferðslan eftir Oyggjarvegnum.

Hetta kom illa við hjá summum bilførarum, tí hált var í morgun.

Fyrireikararnir hava í vikur arbeiddu við at leggja venjingina til rættis. Teir kundu ikki vita, at júst henda dagin fór at verða hált. Teir høvdu tó fyrireikað seg til møguliga hálku á Oyggjarvegnum, tí tíðliga í morgun varð farið farið at salta Oyggjarvegin, og saltað varð serliga væl í dag, verður sagt av politistøðini í Havn.

## Í MORGIN




Gul til stívt andøvsgul av norði, seinnapartin veksur hann vindin upp í skrið. Kavaælingur, men kanska onkur sólglotti og hitalagið millum -1 og +2 stig.

## FRÍGGJADAGIN




Strúkur í vindi ella hvassyr vindur av landnyrðingi, seinnapartin nakað minni vindur. Kavaælingur, men eisini sólglottar og hitin millum -1 og +2 stig.

## LEYGARDAGIN




Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt kavaælið. Hitalagið millum -2 og +1 stig.

Veðrið sunnudagin og mánadagin:
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og sólglottar, men eisini kavaælingur. Hitalagið millum -2 og +2 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Millum eitt Hátrýst, 1032 hPa. yvir Grønlandsfjørðinum og eitt lágtrýst, 985 hPa. yvir Eystrasalti rekur køld luft av landnyrðingi móti Føroyum.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið yvir Norska Havinum stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum hósmorgunin.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 127 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | 5 | **Tromsø** | 6 | **Moskva** | 16 | **Athen** | 26 |
| **Reykjavík** | 11 | **Bergen** | 12 | **Berlin** | 25 | **Beijing** | 30 |
| **Tórshavn** | 10 | **Oslo** | 22 | **Paris** | 20 | **New Dehli** | 30 |
| **Lerwick** | 9 | **Stokkhólm** | 20 | **Madrid** | 28 | **Bangkok** | 34 |
| **Aberdeen** | 12 | **Keypmannah.** | 19 | **Róm** | 26 | **Sydney** | 14 |
| **London** | 19 | **Helsinki** | 16 | **Malorca** | 26 | **New York** | 33 |

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 15. nov | Mánin longst frá jørðini |
| 21. nov | Fullmáni |
| 28. nov | Seinna kvarter |
| 30. nov | Mánin næstur jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 24. nov | 08:12 | 20:37 | 07:12 | 19:37 | 07:27 | 19:52 | 10:12 | 22:37 | 11:12 | 23:37 | 06:27 | 18:52 | 05:27 | 17:52 | 08:27 | 20:52 | 09:27 | 21:52 | 07:57 | 20:22 | 09:12 | 21:37 |
| 25. nov | 09:03 | 21:28 | 08:03 | 20:28 | 08:18 | 20:43 | 11:03 | 23:28 | - | 12:03 | 07:18 | 19:43 | 06:18 | 18:43 | 09:18 | 21:43 | 10:18 | 22:43 | 08:48 | 21:13 | 10:03 | 22:28 |
| 26. nov | 09:53 | 22:17 | 08:53 | 21:17 | 09:08 | 21:32 | 11:53 | - | 00:28 | 12:53 | 08:08 | 20:32 | 07:08 | 19:32 | 10:08 | 22:32 | 11:08 | 23:32 | 09:38 | 22:02 | 10:53 | 23:17 |
| 27. nov | 10:41 | 23:18 | 09:41 | 22:18 | 09:56 | 22:33 | 00:17 | 12:41 | 01:17 | 13:41 | 08:56 | 21:33 | 07:56 | 20:33 | 10:56 | 23:33 | 11:56 | - | 10:26 | 23:03 | 11:41 | - |
| 28. nov | 11:55 | - | 10:55 | 23:31 | 11:10 | 23:46 | 01:18 | 13:55 | 02:18 | 14:55 | 10:10 | 22:46 | 09:10 | 21:46 | - | 12:10 | 00:33 | 13:10 | 11:40 | - | 00:18 | 12:55 |